

# SASH! vitjar í Føroyum

Kendi týski teknobólkurin SASH! frá nítiárunum fer seinni í mánaðinum at spæla síni hittløg í Rex. "Encore une Fois", "Ecuador" og "Stay" er kendastu løgini hjá SASH! Tey hoyra 90-árunum til og vórðu regluliga spæld í eitt nú Club 20, sum dansistaðið Eclipse æt tá. Hóast tann tíðin er farin, kunnu føroyingar seinni í mánaðinum droyma seg aftur til gamlar teknodagar. Sash, ið eigur løgini, sum hittaðu stórt á evropeisku dansigólvunum seinast í farnu øld, vitjar dansistaðið Rex fríggjakvøldið 24. oktober.

# Studningur hækkaður í virði



*Trý føroysk lesandi í Reykjavík. Frá vinstru Marita Guttesen úr Havn, og Sølvi Ragnarsson og Sóley Heradóttir Hammer úr Klaksvík*

**Fyri føroysk lesandi í Íslandi er studningurin heimanifrá hækkaður munandi í virði seinastu tíðina. Hetta er ein fyrimunur beint nú, men við teimum príshækkingum, sum longu hava verið og helst koma at taka dik á seg komandi tíðina, verður talan um eina stokkuta gleði**

**Reykjavík:** Íslendska fíggjarkreppan merkist eisini hjá teimum føroysku lesandi í Reykjavík. Longu nú eru prísirnir á vørum hækkaður og kemur at hækka uppaftur meiri komandi tíðina.

Sosialurin hitti í gjár tríggjar ungar føroyingar, sum lesa stjórnmálafrøði.

– Allar vanligar vørur eru hækkaðar, og leigan er eisini hækkað. Hinvegin eru vit heppin, tí føroysk lesandi í Íslandi fáa danskan SU-studning, og teir peng-arnir eru hækkaðir í virði, nú íslendska krónan er so nógv fallin. So á tann hátt stendur ikki so illa til hjá okkum, sigur Sóley Heradóttir Hammer úr Klaksvík.

Hon vísir á, at hetta helst verður ein stokkut gleði, tí við príshækkingum og útlitinum til, at krónan aftur kemur at hækka, ja, so verður tað helst trupult kortini at fáa tað fíggjarliga at hanga saman.

Hjá Maritu Guttesen úr Havn, sum lesur í Keypmannahavn, men í løtuni er í praktikk á Sendistovu Føroya í Reykjavík, hevur kreppan fíggjarliga fyribils verið til hennara fyrimuns.

– Tá eg rindaði innskot fyri leigumálið, var mánaðarliga leigan 4.000 danskar krónur, og nú er hon undir helvtina, so beint nú er gott at hava útlendsk gjaldskort. Men um alt gerst dýrari, so er spurningurin, hvussu leingi hetta verður ein fyrimunur, sigur Marita Guttesen.

Sølvi Ragnarsson úr Klaksvík hevur havt eina serliga uppliving við teimum ótryggu kursviðurskiftinum, sum valda í løtuni við íslendska gjaldoyranum.

– Eg keypti eina teldu fyri 122.000 íslendskar krónur, og tá handilsmaðurin koyrir kortið ígjøgnum, vísir hetta 6.000 danskar krónur. Hetta fekk eg ikki til at passa, tí heimaifrá hevði eg fingið tað til at verða 3.000 danskar krónur. Eg bað hann strika gjaldingina, og gera hana umaftur í íslendskum krónum, og tá stemmaði, so eg fekk telduna fyri 3.000 danskar krónur. Um eg ikki hevði havt tjekkað prísin áðrenn, so var eg komin til at gjalda tað tvífalda, sigur Sølvi Ragnarsson.

## Nógvir fyrispurningar

Á føroysku sendistovuni í Reykjavík hava tey úr at gera við at svara spurningum, ið snúgva seg um ta ótryggu fíggjarstøðuna í Íslandi.

– Vit hava fingið sera nógvar spurningar frá føroyingum, um teir kunnu brúka danskt visakort heryviri, ella hvat gjaldoyra, man skal taka við og so víðari, sigur Marita Guttesen.

Sóley Heradóttir Hammer greiðir frá, at hon hevði sum uppgávu at gera eina lítlan búskaparfrágreiðing um Ísland. Í verandi støðu er hendan uppgávan nú høvuðsuppgáva hjá øllum fýra á sendistovuni at savna inn tilfar og vitan um.

Tey trý føroysku lesandi lata annars væl at lestrarumhvørvinum í Reykjavík.

– Her eru eini 10.000 lesandi á lærda háskúlanum, og umstøðurnar eru í topp. Nýggir bygningar, nýggjar teldur og gott samskifti. Eisini hendir tað nógv millum tey lesandi, har studentafeløg og onnur skipa fyri tiltøkum, so man keðir seg ongantíð, sigur Sølvi Ragnarsson.

Spurd um, hvussu tey uppliva íslendingar fyrihalda seg til kreppuna, sigur Sóley Heradóttir Hammer:

– Vit hava tosað nógv um hatta á skúlanum, og eg má siga, at tey eru rættiliga sjálvkritisk viðvíkjandi tí, sum hent er og royna at finna útav, hví land teirra er komið í hesa støðuna. Tað eru sjálvandi fleiri meiningar um hetta. Nógvir íslendingar samanbera teirra kreppu við hana, sum rakti Føroyar í nítiárunum og royna at læra av henni. Hetta, at so nógvir føroyingar fluttu av landinum, og hvussu man kann forða, at tað sama hendir fyri Ísland, sigur Sóley Heradóttir Hammer.

At umdømið hjá íslendingum er versnað uttanlands, fingur tvær ungar íslendskar kvinnur at sanna, tá tær nú ein dagin fóru inn í ein taskuhandil í Keypmannahavn. Marita Guttesen greiðir soleiðs frá søguni, sum hon júst hevur lisið í Morgunblaðnum.

– Handislmaðurin var sera áhugaður at selja teimum taskur, men so gjørdist hann varur við, at tær tosaðu íslendskt sínamillum, bað hann tær fara út úr handlinum. Hetta er nokk eitt eindømi, men bara at tað hendir, sigur nógv í sær sjálvum, heldur Marita Guttesen.